Bjørg Hentze

Fra: Bjørg Hentze
Sendt: 27. februar 2023 10:17
Til: Bjørg Hentze
Emne: Viðmerkingar frá TAKS til lógaruppskot um Mínboks

Fra: Birta Biskopstø <Birta.Biskopsto@taks.fo>
Sendt: 9. februar 2023 16:23
Til: Marjun Jacobsen <Marjun@fmr.fo>
Cc: Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>
Emne: Viðmerkingar frá TAKS til lógaruppskot um Mínboks

TAKS hevur fylgjandi viðmerkingar:

Er § 3, stk. 2, einans galdandi fyri samskifti við viðskiftafólk, eins og framgongur av viðmerkingunum, so eigur hetta at standa í lógartekstinum. Hugtakið "viðskiftafólk" kann samstundis við fyrimun lýsast í § 2.

Sambært § 9, stk. 2, verður § 3, stk. 2, sett í gildi við kunngerð. TAKS mælir til, at § 3, stk. 2, ikki verður sett í gildi innan fullgóð loysn fyri samskifti við virki, herundir (tillagað) Mínboks til virki, er tikin í nýtslu. TAKS samskiftir nevniliga javnan við virki, herundir grannskoðaravirki, bókhaldsvirki og advokatskrivstovur, um viðurskifti hjá kundum teirra, og hevur TAKS til tílíkt samskifti amboð til at brongla upplýsingar um neyðugt. Tí er tað týdningarmikið, at ein kravdur, talgildur samskiftisháttur ikki verður til ampa fyri arbeiðið hjá TAKS, soleiðis at arbeiðið seinkast ella gerst truplari ella dýrari.

Vinarliga

Birta Biskopstø
Deildarstjóri

Lógardeildin og Tolldeildin

TAKS

Postrúm 2151, 110 Tórshavn

www.taks.fo, taks@taks.fo, tel. 35 26 00

Fyrivarni

Ert tú ikki rætti móttakari av hesum teldubrævi, vinarliga sig mær frá og sletta brævið.